skemt

Lagt til rættis: Jákup Mørk

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

### Men so vita teir…

»Í hesi kappingini fáa luttakararnir ikki at vita hvar teir standa, men bert um teir eru inni ella úti«

**Lisið í Dimmalættting**

### Er tá nakað at stjala?

»…av ótta fyri at tjóvar skulu gera um seg í tómu húsunum«

**Hoyrt í Degi og Viku**



### Ein serligur guitar

»…Elin, sum slóg á tangentarnar á gamla guitarinum«

*Lisið í Sosialinum*

## Orðaspæl

Er ein tvørpolitiskt semja ein semja, har tann tvørasta politikkarin fær sín vilja?

Tá fimm bilar renna saman, er tað ein harmonikusamanstoytur. Men tá fimm harmonikur renna saman. Er tað tá ein bilasamanstoytur?

# »Tussjfordrív«




Vit nýta ofta orðið "tíðsfordrív" í staðin fyri tað føroyska "dagdvølja" ella "tíðarstytting", men við einum tussjpenni ber eisini til at skriva bert til "tussjfordrív".

mg

# Løgin parkering



Ivaleyst visti bilførarin ikki, nær tað aftur fór at toyða. Og í øllum førum mundi hann ella hon ikki sansa, at tað skuldi ganga somikið skjótt. Í øllum førum mundi viðkomandi gerast bilsin, tá hendan sjónin kundi staðfestast.

Sosialurin